# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo




*Fyrrverandi liðfelagarnir á danska landsliðnum vóru báðir nøgdir um dystin, men tóktust eisini samdir um, at teir hvør í sínum lagi kundu læra nakað av dystinum*

**Mynd: Rúnar Reistrup**

## Morten eitt sindur klókari

*Í fyrireikingunum var hann vorðin ovfarin av føroysku dygdunum, og undir dystinum helt hann seg hava lært sítt lið eitt sindur betur at kenna*

Morten Olsen er ein royndur og drivin revur í fótbóltsverðini. Hann veit, hvussu allar støður skulu taklast, og bæði hann og Michael Laudrup vita, hvørjar knøttar teir skulu trýsta á, tá almenningurin spentur bíðar fyri at hoyra:

– Eg eri nøgdur við, at tað eydnaðist okkum at vinna. Hetta var fyrsti sigurin hjá Danmark í ár, og at vinna 2–0 í Føroyum er ikki bara nakað, sum kemur av sær sjálvum, segði Morten Olsen, og so hevði hann ein lítlan fyrilestur um, hvussu stór framgongdin hevur verið í føroysum landsliðsfótbólti:

– Hesar báðar dagarnar, sum vit hava verið í Føroyum, havi eg í video sæð fleiri av undankappingardystunum, sum føroyingar spældu í fjør. Eg havi staðfest, og eg havi sagt fyri mínum spælarum, at talan er um eitt væl skipað lið, sum tað er ógvuliga torført at skapa málmøguleikar ímóti. Dystirnir móti Kekkia á heimavølli og eisini á útivølli eru góð dømi um hetta. Í Prag haldi eg, at føroyingar høvdu fleiri málmøguleikar enn heimaliðið, og tað var sera óheppið, at Todi Jónsson ikki í hvussu so er fekk eitt mál.

Við hesum undirstrikaði Morten Olsen fyritreytirnar, sum hansara lið hevði vunnið 2–0 á Tórsvølli:

– Í 1. hálvleiki spældu føroyingar upp til okkara spæl, men eftir steðgin. Tað gjørdu teir eisini, tí vit høvdu ilt við at seta ta ferðina á, sum er neyðug fyri at fáa fleirtalsstøður og harvið skapa vandamiklar málmøguleikar. Vit justeraðu eitt sindur í steðginum, og tað eydnaðist í hvussu so er í eina løtu í 2. hálvleiki at hava hægri leikferð, og tað var tá, at vit skoraðu málini. Morten Olsen undirstrikaði, at hann longu frammanundan dystinum hevði avrát við venjararnar hjá Bjarna Goldbæk og Jon Dahl Tomasson, at teir skuldu bara spæla 45 minuttir. Teir hava í hesi vikuni nógv at gera í feløgunum hjá sær.

### Nýggja avbjóðingin

Undan dystinum hevði Morten Olsen sagt, at umframt at vinna var týdningarmikið hjá honum á Føroya ferðini at finna fram til styrkir og veikleikar á sínum liði.

Hvat var pluss, og hvat var minus?

– Tað snýr seg um støðurnar á vøllinum og innanhýsis fatanirnar. Hetta eru smálutir, men teir eru týdningarmiklir. Tað má eitt nú ikki koma fyri, at ein av mótstøðumonnunum stendur so leysur í brotsteiginum, sum Uni Arge gjørdi, tá hann fluktaði hornasparksinnleggið úr høgru móti málinum. Vit hava bara vant tvær ferðir saman, og nú fara vit at arbeiða fram ímóti næstu uppgávni, sum er undankappingardysturin í Íslandi um góðar fjúrtan dagar.

Kanst tú út frá avrikinum í kvøld gera tær nakrar metingar um, hvussu tað tá fer at ganga?

– Eg fekk í kvøld staðfest, at fleiri av liðunum, sum fara at koma til Føroya, fara at fáa tað torført. Áðrenn eg sigi nakað um okkara møguleikar í Íslandi, má eg fáa henda dystin úr huganum, men sjálvandi verður tað torført í Reykjavík. Tað hevur tað altíð verið, og tað verður tað eisini hesa ferð.

Allan Simonsen er føroyskur landsliðsvenjari, men hann hevur 56 ferðir spælt á danska landsliðnum. Fyrsta landsdystin spældi hann í Íslandi í 1972. Danmark vann 5–2, og Allan Simonsen skoraði tvey mál:

– Tað verður torført hjá Morten Olsen, Michael Laudrup og spælarunum í Reykjavík, men eg vænti, og sjálvandi vóni eg staðiliga, at tað fer at eydnast teimum at fáa øll stigini við aftur til Danmarkar, men tað verður sera torført. Tað er eingin ivi um tað, staðfesti Allan Simonsen.

Morten Olsen vildi fegin rósa gamla landsliðsfelaganum við arbeiðnum, sum hann hevur gjørt í Føroyum:

– Nógvir føroyingar spæla aðra staðni, og tað er gott fyri landsliðið. Men eg vil fegin siga, at tað sæst væl, at tað hevur eydnast Allani Simonsen at samanspæla eitt fínt lið. Fótbóltur er eitt liðspæl, og avrikini og úrslitini eru fyrst og fremst tengd at, hvussu liðið útinnir sínar uppgávur. Eg havi verið í Føroyum við veteranlandsliðnum og við Brøndby, og eg má siga, at føroyskur landsliðsfótbóltur er á einum væl hægri støði nú, enn hann var fyri ellivu og átta árum síðani.

JH

## Allan iðraði seg um málini

*Føroyski venjarin var stak væl nøgdur við verjupartin, men staðfesti samstundis, at tað var, tá tankarnir í lítlari løtu ikki vóru savnaðir heilt um verjupartin, at tað kiksaði*

Allan Simonsen var ikki ónøgdur á tíðindafundinum. Úrslitið kundi hann væl liva við, men hann iðraði seg um, at danir akkurát skuldu fáa tey bæði málini, sum teir fingu:

– Tað seinna málið er ein stór gáva. Jens Martin Knudsen ger eitt stórt mistak. Hann hevur tikið málið á seg, og hatta eigur ikki at koma fyri. Í fyrra førinum er Jan Heintze snildur, men hann sleppur ov lætt ígjøgnum í vinstru. Frammanundan hevði eg tosað nógv við spælararnar hjá mær um, hvussu vandamikil Ebbe Sand er, tá bóltarnir koma innfyri, og so kemur tað fyri, at hann stendur púra blankur mitt fyri málinum. Tað eigur ikki at koma fyri.

*Iðrar tú teg um, at tú í steðginum skifti málverja?*

– Yvirhøvur ikki. Tað var avrátt frammanundan, at teir skuldu spæla ein hálvleik í part.

*Men heldur tú teg nú vita betri, hvør skal verja málið, tá Slovenia kemur á Svangaskarð um góðar tvær vikur?*

– Eg velji at siga, sum Morten Olsen segði. Nú mugu vit fyrst fáa henda dystin úr kroppinum, og so fara vit at hugsa um næsta mótstøðuliðið, hvussu vit skulu spæla og hvørjir skulu spæla við.

Morten Olsen helt, at danir fingu málini, tí teir høvdu sett ferðina upp. Allan Simonsen var ikki heilt samdur í hesum. Hann helt, at tað vóru føroyingar, sum fóru eitt sindur niður í ferð í eina løtu:

– Tíbetur javnaði hetta seg, og eg haldi ikki, at vit nakrantíð vóru niðurspældir. Vit megnaðu at spæla okkum til møguleikarnar, sum vit fáa so at siga hvørja ferð, men tíverri eydnaðist tað heldur ikki hesa ferð at fáa nyttu burturúr teimum.

*Hvørjir føroyskir spælarar heldur tú stóðu sterkast í myndini?*

– Allir kunnu vera nøgdir. Skal eg taka onkran einstakan burturúr, so haldi eg, at tað var sera hugaligt at staðfesta, at Julian Johnsson aftur tykist vera á tí støðinum, sum hann áður hevur verið á landsliðnum. Tá hann er so væl fyri, sum hann var hesa ferð, so er hann ógvuliga týdningarmikil fyri okkum. Eg haldi eisini, at Øssur Hansen hevði væl fatur á Dennis Rommedal, og á miðvøllinum var John Petersen eyðsýndur.

*Saknaði tú Pól Thorsteinsson?*

– Undarligt at tú spyrt um tað. Eg hugsaði tað undir dystinum og nevndi tað við Jógvan Martin Olsen, at Pól hevði akkurát verið typan at spælt í kvøld. Vit hava nógvar stórar spælarar, og tað er gott, men tað er altíð best, tá tú hevur nógvar ymisk sløg av spælarum. Um Pól Thorsteinsson hevði verið tøkur, so høvdu vit havt uppaftur ein møguleika at arbeitt við. Vit gleða okkum at fáa hann við aftur komandi ár, segði ein ikki illa nøgdur landsliðsvenjari, sum longu í komandi viku fer at boða frá, hvørjar spælarar hann ætlar at brúka, tá Føroyar sunnudagin 3. september fara at spæla ímóti Slovenia.

JH

## Tað var brotsspark

*Uni Arge harmaðist um, at tað ikki eydnaðist at fáa meira burtur úr royndunum móti málinum*

Jákup Mørk

Einar fýra minuttir inn í seinna hálvleik kom rættuliga lív í føroysku áskoðararnar. Eftir innlegg úr vinstru, stóð Uni Arge í góðari skotstøðu, men tá skotið varð latið av, vardi Thomas Helveg fyri við hondini.

### Eingin ivi

Sjálvur greiðir Uni soleiðis frá hendingini:

- Bólturin kom væl fyri til mín. Eg skeyt beinanvegin, og roknaði við, at antin fekk málverjin vart fyri inni á strikuni, ella sat bólturin í málinum. Knappliga steðgaði bólturin, tá hann rakti hondina á Helveg, og eg ivaðist ikki í, at talan var um brotsspark.

Dómarin lat tó ikki við seg koma, og tá tað hendir, so vónar man um ikki annað, at linjuverjin hevði sæð hendingina. Hann lætst tó heldur ikki um vón, og tí rann eg yvir til hansara, og segði honum, at hatta altso ikki var nóg gott.

At Uni hevur grein í sínum máli er helst einki at ivast í, um hugt verður at myndarøðini á hesi síðu.

### Óheppin

Iðraði Uni seg um væntandi brotssparkið, var støðan heldur ikki stórt betri, tá tosið kom inn á næstu skotroynd hansara. Hetta var, tá hann eftir hornaspark heilfluktaði bóltin, sum umvegis eitt danskt bein varð avrættaður út aftur til horna:

- Tann bólturin lá perfekt, og eg ivist ikki í, at hann hevði farið í málið. Onkursvegna rakti hann tó eitt bein á vegnum, soleiðis at vandin var av.

### Upp við høvdinum

Annars helt Uni um dystin, at sum heild kunnu føroyingarnir vera væl nøgdir við avrikið.

Hann fýltist tó á, at føroysku leikararnir fóru so langt niður við høvdinum eftir danska málið:

- Vit eru eftirhondini komnir á eitt slíkt støði, at okkum ikki nýtist at fella í fátt, um mótparturin fær eitt mál. Vit hava fleiri ferðir víst, at spæla vit okkara spæl, so koma møguleikarnir. At danir fingu somikið stóra yvirvág í seinna hálvleiki komst av, vit mistu luftina reint mentalt, og tað haldi eg ikki, vit kunnu vera nøgdir um, segði Uni Arge at enda.



*Uni hevur eyguni vend móti málinum, beint eftir at skotið er latið av*



*Bæði Uni Arge og Sámal Joensen varnast, at Helveg hevur havt hon á bóltinum*



*At talan er um brotsspark eru føroysku leikararnir als ikki í iva um*



**Myndir: Álvur Haraldsen**

*Men alt endar kopritni við, at Schmeichel lættliga kann fáa hendur á bóltinum*




*Umframt at rósa føroyska liðnum, helt Thomas Gravesen eisini nóg um 12. mann okkara*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

## Fegin um skjóta málið

*Ein av leikarunum, sum nógv verður roknað av í framtíðini, er nýkosni Everton lekarin, Thomas Gravesen*

Jákup Mørk

Tað var ein Thomas Gravvesen í góðum lag, sum kom út úr B36-húsinum, har danska landsliðið hevði skiftishøli.

Lagið gjørdist heldur ikki verri, tá tosið fall inn á júst lidna dystin, hóast hann ásannaði, at danir í løtum høvdu havt tað sera trupult.

### Taktiskt sterkir

- Talan var um ein ógvuliga torføran dyst fyri okkara viðkomandi, og serliga í fyrra hálvleiki eydnast tað sera væl hjá føroyingum at bremsa okkara spæli. Teir tóktust eisini vera sera væl fyri taktiskt, soleiðis at teir í verjupartinum vóru væl skipaðir, og eisini hetta var við til at gera tað torført hjá okkum, helt Gravesen eftir dystin.

Víðari segði hann, at hann var sera fegin um, at danir fingu lagt seg á odda somikið tíðliga í seinna hálvleiki. Hann vísti á, at teir sjálvandi royndu at seta leikferðina upp, tá farið varð inn aftur á vøllin, men hann helt serliga, at tað var málið sum viðførdi, at danska spælið gekk betri í seinna hálvleiki:

- Tað merktist beinan vegin á sjálvsáliti okkara, soleiðis at vit gjørdust nógv meira frígjørdir í okkara spæli.

Um umstøðurnar kring vøllin helt Everton leikarin, at áskoðararnir rættuliga gjørdu sítt til, at talan gjørdist um eitt stuttligt kvøld:

- Stemningurin kring vøllin var sera góður, og føroysku áskoðararnir royndu alla tíðina at díkja á sínar menn, og tað ger tað sjálvsagt stuttligari at vera á vøllinum.

### Vón um fast pláss

Gravesen er annars ein av teimum, sum nógv verður roknað av í framtíðini. Umvegis Hamburger SV í Týsklandi, er hann nú at síggja hjá enska Everton, og eftir venjingardystunum at døma, verður hann fastur fúsur á miðvølli teirra.

Mikudagin spældi hann á miðvøllinum, og hann duldi heldur ikki fyri, at hetta er tað plássið, honum dámar best at spæla.

Hann dugdi tó als ikki at siga, um hann roknaði við, at hetta skuldi vera fasta pláss hansara framyvir: - Bara tað at vera við á landsliðnum er ein stórur heiður, og eg vóni, at eg framhaldandi verið partur av liðnum. Hvar og hvussu eg spæli má so vera upp til venjaran, segði Thomas Gravesen at enda.